eyga í Kunstavisen avdúkar til dømis, at Danmark flýtur yvir við vánaligari “færøkunst”. Eisini eiga vit í størri mun ansa eftir viðvíkjandi stuðuli til listafólk, at miðsavna okkum um nøkur fá seriøs og góð listafólk. Vit mugu sum heild ansa betri eftir góðskuni og lata vera við at blanda okkum upp í ivasom tiltøk eins og tað í Leopold Museum í Wien, sum í sínum savni skal hava fleiri verk, sum nazistarnir stjólu frá jøðum undir krígnum. Á hesum savni var einasta altjóða satsing av føroyskari list í 2008, og tað er spell, at hon skuldi gerast so tivoliserað og kulørt við fótbóltshúgvum, lundabamsum og skramblilist ið púra kritikk-leyst var blandað saman við stórfingnari list hjá Steffani Danielsen og øðrum.



*Eitt av teimum áhugaverdu, ungu listafólkunum: Halldis Olsen*



*Ein óvanlig sjón í Klaksvík og føroyskari myndlist*



*Øssur Johannesen hevði eina fína framsýning við síni outsider-art*

*Nógvar myndir hjá Mariusi Olsen hava eitt listarligt metastøði*



*Anker Mortensen á Heystframsýningini*



## Standmyndir

Í 2008 vóru standmyndirnar hjá Hans Paula Olsen fyri óvanliga hvøssum atfinningum, sum mundu vera elvdar av eini lutfalsligari yvireksponering av listamanninum, ið hetta árið gjørdi fleiri standmyndir, ið vórðu avdúkaðar ymsastaðni í Føroyum. Atfinningarnar eru í stóran mun órættvísar, um hugsað verður um, at Hans Pauli dugir, og at hann bert roynir at nøkta stóra eftirspurninginum eftir hansara standmyndum. Tað er mær vitandi eingin lóg í móti, at kommunur og onnur kunnu biðja eitt nú útlendsk listafólk um at koma við hugskotum til tílíkar uppgávur; tað hevði verið frískligt um til dømis ein av múrsteinsstandmyndunum hjá Per Kirkeby, ein av glasstand-myndunum hjá Danny Lane ella okkurt heilt annað varð uppsett her á landi.

Filmurin um Hans Paula Olsen var tann fyrsti av trimum føroyskum filmun, ið viðgera myndlistafólk; Katrin Ottarsdóttir gjørdi filmin um Hans Paula Olsen: “Eingin kann gera tað perfekta” og filmin um Tórodd Poulsen “Ein regla um dagin má vera nokk”, meðan Ingun í Skrivarastovu gjørdi ein styttri film um Hans Paula og nestor okkara, Janus Kamban, sum fyllti 95 í ár í 2008.

## Viðvendur andstøðingur

Tóroddur Poulsen hevur havt eitt - sjálvt fyri hann – óvanliga gróðrargott ár við fleiri útgáv-um (katalog, yrkingar, prosa, tónleikur, myndlist, filmur) og framsýningum, eins og hann eisini varð innstillaður til norðurlendsku bókmenta-heiðurslønina. Viðburðurin hevur verið so totalur hetta árið, at sjálvt ein notoriskur tóroddandstøðingur sum Kim Simonsen viðmældi filmin “Ein regla um dagin má vera nokk” millum annað við orðingini: “Ein Tóroddur um dagin heldur keðseminum burtur”. Høgni Djurhuus í Útvarpinum rósti filminum, samstundis sum hann ásannaði, at orsøkin til at honum dámdi filmin helst var, tí honum dámdi Tórodd. Høgni var ein av fleiri, sum segði seg tiknan á bóli av myndlistini hjá Tóroddi Poulsen, sum enn ikki er eins kend millum manna, sum bøkurnar eru.

Í sama viðfangi kann ásannast, at trøini sum kunnugt á ongan hátt vaksa inn í himmalin og heldur ikki her hjá okkum fjøllini, tí hóast ummælarar alt árið frøddust um Tórodd, var einki listaverk selt á teirri frálíku framsýningini, sum Tóroddur og Claus Carstensen høvdu saman í Norðurlandahúsinum í desember, og sum yvirritaða hevur hildið seg frá at skammrósa bert av tí einu orsøk, at tað var hon sjálv, sum fyriskipaði framsýningina saman við Urd Johannesen í Norðurlandahúsinum. Claus Carstensen sýndi fram film frá The Killing Fields í Cambodia: “Reths Monologue”, sum full-komiliga skelkaði, samstundis sum hann fekk onkran at grunda yvir, um hesin dokumentarfilmur kundi bólkast sum ein listaupp-living.

## Livandi List

Ein stórhending innan myndlistina í ár var, tá fyrsta yvirlitsverkið síðan bókin hjá Bárði Jákupsson Myndlist í Føroyum (2000); bókin Livandi List hjá Inger Smærup Sørensen kom út. Millum listafólkini hevur nakað av kjaki verið, har summi hava verið vónbrotin yvir úrvalið og hildið tað verið alt ov breitt og óvandið, meðan onnur hinvegin hava saknað listafólk sum til dømis Heðin Kambsdal og onnur í listafólkahópinum, sum umboðaður er í hesum yvirlits-verki. Óansæð er talan um áhuga-verdar og væl skrivaðar tekstir um 49 føroysk samtíðarlistafólk. Ummælarin her á blaðnum var ógvuliga hugtikin og skrivaði m.a.: “Bókin er í nógvar mátar ein fongur fyri listaáhugaðar føroyingar og onnur, ið hava saknað eitt yvirlit yvir og inn-leiðslu í føroyska nútíðarlist... Hóast bókin ongan iva letur vera um, at Inger Smærup Sørensen er serfrøðingur á sínum øki, er tað týðiligt, at hon ikki hevur gloymt at undrast yvir, stuttleika sær við og bara njóta listina..” (Anna V. Ellingsgaard).

## Tað besta vit eiga

Virksemið hevur verið nógv og gott á Grafiska Verkstaði Føroya, sum umframt eina rúgvu av frálíkum prentum hjá Tóroddi Poulsen eisini hevur verið karm-ur um eina sera áhugaverda myndarøð hjá Claus Carstensen, ið hann nevndi “Sanpaku-svitan”. Eisini hava listafólk sum Cathrine Raben Davidsen, Tórbjørn Olsen, Zacharias Heinesen og mong onnur arbeitt hjá Jan Andersson og Fríðu Brekku á Grafiska Verkstaði Føroya hetta árið. Tó at einstøk av teimum framsýnandi listafólkunum ikki livdu upp til høga góðskustøðið, sum hesin listafólkabólkurin sjálvur hevur sett sær fyri at røkka, var Heystframsýningin uttan iva so nógv tann besta av ársins føroysku felagsframsýningunum við framúr myndum hjá millum øðrum Hjördis Haack og Bjarna Werner Sørensen. Hesin listafólkabólkur umboðar fleiri ættarlið frá Zachariasi Heinesen í eldra endanum til Rannvá Kunoy í yngra. Síðstnevnda sýndi fram eina áhugaverda og serstaka røð av steinprentum, sum sameina eitt ítøkiligt, tilfarsligt árin við nakað óítøkiligt og sveimandi. Rannvá Kunoy hevur givið Studentaskúlanum í Hoydølum hesa myndarøðina. Bárður Jákupsson hevði millum annað tveir stórar málningar við á framsýningini, ið myndevnisliga taka støði í okkara loddrætta kletta- og fjallalandslagi, sum hann byggir upp við brúnum, grønum, bláum, gráum, gulum og violettum linjum, ið frýrisliga ganga á skák gjøgnum mynda-

*Framhald á næstu síðu*